# BØNARLØTAN

JANUAR 2023 38. árg.

*Tey, sum bíða eftir Harranum, fáa nýggja kraft. Es. 40.31*

## *1. Nýggjársdagur* — *Lukas 4.1-21*




## PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)
## Carol og Poul Joensen

Biðið fyri næmingunum, ið byrja aftur við lestrinum á skúlanum hjá NTM í Onglandi. Eg fyrireiki undirvísingina til eitt lestrarskeið og fyrireiki ferðina til Sorimi í apríl. Carol er partur av toyminum, ið samskipar og leggur til rættis ungdómsstevnuna í mars.

## NÝGGJÁRSMØTIR Í BULI

Í Buli á Signabø 6 - 8. jan., fríggjakv. og leygarkv. kl. 20, sunnukv. kl. 19. **Sangur:** John Færø, Kvartettin í Betesda og Manskórið í Ebenezer. **Talarar:** Poul Færø, Eyðfinn Reyðberg, Arne Simonsen og Jákup N. Olsen.

**KRINGVARPIÐ**
8. jan. sjónvarpsandakt, Niels Pauli Nónstein.

**EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á www.evr.fo)**
Sunnukv. kl. 21.00. Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv. kl. 21.00. Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

## *2. Mánadagur* — *3.Mós. 1.1-17*



**DANMARK, Kristnastova**
**Sólva og Jákup Hansen**
**Susan og Øssur Berghamar**
Vit ynskja øllum eitt signað 2023 við tøkk fyri forbøn og samskifti í farna ári. Tað er í dag torførari enn áður at finna fram til, hvar føroyskir sjúklingar eru innlagdir. Tí er tað enn meiri umráðandi, at tit – umframt at biðja fyri hesi tænastu – siga okkum frá, tá tit vita um onkran, sum kemur higar í sjúkraørindum.
berghamar@kristnastova.dk

## *3. Týsdagur* — *Lukas 4.22-44*

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**
3-6. jan. hava vit skeið fyri allar NTM leiðarar í Filipsoyggjum. Mitt í jan. vitja vit trúboðarar á oynni Mindanao, ið læra seg málið har, áðrenn teir flyta inn í onkran ættarbólk at virka. Síðst í jan. liggur leiðin til Singapore og Jakarta, har vit verða um tveir dagar á hvørjum plássi. Endamálið er at tosa við NTM-leiðslurnar.

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

Biðið fyri Joy og Caleb, yngsta syni okkara. Tey skulu giftast 3. jan. Sonurin Philip vitjar saman við Natalie, Louis og Timon, og sonurin Daniel vitjar saman við Krissy og Zephaniah. Daniel og tey fara aftur til Indonesia 10. jan., meðan Philip og tey steðga til síðst í jan.

**ZAREPTA**

Minnist vetrarlegur og samkomulegur!

## *4. Mikudagur* — *3.Mós. 2.1-16*

**FØROYAR**
**Dora og Niels Pauli Nónstein,**
**Sigrid 15, Andreas 13, Kristina 11**

Undirtøkan hevur verið góð, nú frítíðararbeiðið í Ebenezer er byrjað aftur, eftir at korona steðgaði tí. Tey eru mong kring landið, sum gera eitt týðandi arbeiði millum børnini, fyri at tey skulu koma til trúgv á Jesus.

**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen,**
**Josva 13, Ester 12, Samuel 8**



## *5. Hósdagur* — *Sálm. 62*

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen, Ryan 13**

Jólini saman við familjuni vóru góð. Vit koma til Dakar fyrst í jan., tá Ryan byrjar aftur í skúlanum. Biðið, at vit falla væl til aftur í tænastuni.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## *6. Fríggjadagur* — *Lukas 5.1-20*

**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen.**

Vit hava hildið jól í Klaksvík og hugnað okkum saman við Craig og familju hansara. Vit vitja fleiri samkomur í jan. og fara til Onglands fyrst í feb.



**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 16, Rebekah 14, Lydia 12**

## *7. Leygardagur* — *3.Mós. 3.1-17*



**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

Vit vitja familju og samkomu hjá Nurimar um jóltíðir og inn í jan. Jóhannus skal hava nýtt uppihaldsloyvi um hálvan jan. fyri at kunna verða verandi í landinum. Nú er aftur møguligt at flúgva inn til ættarbólkarnar.

## *8. Sunnudagur* *Lukas 5.21-39*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**
**Adonia 15**

Vit leggja í løtuni videoupptøkurnar út á STEVN heimasíðuna og eru komin eitt stórt stig frameftir. Joy verður í Pakistan til einaferð í mai.

## *9. Mánadagur* *3.Mós. 4.1-19*

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 16, Lydia 5**

Vit takka Harranum fyri trúfesti í 2022 og teimum trúgvandi í Føroyum fyri umsorgan, samfelag og forbøn. Biðið fyri áhaldni í barna- og ungdómsarbeiðnum: sunnudagsskúla, Hobbyklub 8-12 ár og Zion 13-16 ár, sum vit bæði, serliga Sara, eru við í, og at Harrin signar verkið.

## *10. Týsdagur* *Lukas 6.1-19*

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Victoria 16, Emma Grace 15, Jónatan 13, Markus 10, Evita 7, Joy 6**



Haldið á at biðja fyri Guicho og Gabriel og samkomuni í Puruándiro. Tað er lívgandi at hoyra frá teimum - Harrin varðar síni! Vit fara aftur til Meksiko fyrst í juni, tá børnini fáa summarfrí.

**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 12, Tabita 9, Debora 7, Natan 4**
*Í dag fyllir Joy Tuohy 6 ár

## *11. Mikudagur* *3.Mós. 4.20-35*



**PAPUA NÝGUINEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 6, Jude 4, Evelyn 2**
Vit hava keypt ferðaseðlar til Papaua Nýguinea um hálvan jan. Biðið, at vit sum familja falla væl til, at tað fellur okkum lætt at koma inn í nýggja mentan og mál, og at vit líta á Harran og Hansara styrki í øllum.

## *12. Hósdagur* *Sálm. 63*

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**
Vit prísa Gudi, at vit blivu liðug við rættlesturin av Markus-evangeliinum. Nakað er eftir, sum skal gerast í ár. Biðið, at vit klára at taka partin um Jesus upp, hóast upplesarin ikki arbeiðir við okkum í ár, og at upptøkuútgerðin skal virka væl.



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

## *13. Fríggjadagur* *Lukas 6.20-35*

### GRØNLAND, Qaqortoq
### Marjun og Páll Poulsen

Vit eru takksom fyri René, Bibiane og børnini, sum vilja hava eyguni eftir leguhúsinum, sethúsunum, eins og bili og bátum, meðan vit eru heima. Um Gud vil, byrja summarlegurnar 2023 hósdagin 29. juni.

## *14. Leygardagur* *3.Mós. 5.1-26*

### GRØNLAND, Nuuk
### Naalakkap Jiisusip Oqaluffa
### Hans Sivertsen

Legurnar 2023: 29. juni til 6. juli barnalega; 6-13.juli ungdómslega, so outreach í Nuuk; 23-31. juli familjulega. Tilmelding +299 486448 ella via facebook ella +298 771715. Vit útvega bíligari ferðaseðlar til teirra, sum melda til nú!

### Juvel II
### Gull-Britt og Karsten Hansen



Fyrst í árinum vitja vit samkomur kring landið at kunna um arbeiðið í Grønlandi, at vekja áhuga fyri at verða við í verkinum og at minnast tað í bønum tykkara og okkara.

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**
Vit fingu høvi at vitja nakrar føroyingar, ið vilja koma á fund hjá okkum, tá Juvel á hjólum kom framvið í heyst.

## *15. Sunnudagur* *Lukas 6.36-49*

**GRØNLAND, Qasigiannguit (fj.arb.)**
**Solveig og Daniel Kinda**



Biðið, at vit finna fastan bústað í Kalifornina, har vit kunnu taka okkum av mammu Daniel. Vit biðja framhaldandi fyri fólki í Qasigiannguit, ið leita sær hjálp og forbøn yvir telefon og aðrar miðlar.

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**

## *16. Mánadagur* *3.Mós. 6.1-23*

**FØROYAR**
**Birgit og Svenning av Lofti**



Ísraelsferðin á jólum varð avlýst, men ætlanin er at gera ferð á páskum. Eg arbeiði við handriti til bók at koma út í 2023, ið greiðir frá ymsu støðunum, vit vanliga vitja. Vit eru takksom, at sang- og andaktsløturnar á URD mikudagar hava eydnast væl. Ymsu bólkarnir halda á 2023.

**Atlantic Mission, Juvel II**
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Vanja og Svein í Prestgarði, Svend 14, Terji 10, Petra 9**
*Í dag fyllir Hadassa Christiansen 12 ár

## *17. Týsdagur* — *Lukas 7.1-23*

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**
Takk fyri allar bøninar fyri okkum og arbeiðnum í Calvary Church. Harrin hevur signað, og vit síggja fram til stóran ávøkst í 2023.



**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

## *18. Mikudagur* — *3.Mós. 7.1-19*

**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 10, Emma 6**
Eftir nærum hálvt ár í Føroyum er gott at vera saman aftur við La Fonte samkomuni. Vit eru spent og vónrík um tað, sum Harrin fer at gera í hesum nýggja ári!

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 9, Micah 9**

## *19. Hósdagur* *Sálm. 64*

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 12, Leah 9, Abigail 4**

Biðið fyri Luna; hon verður doypt í apríl; Cecile fyrireikar hana til dópin. Vit eru takksom fyri vælvitjaða jólatiltakið í samkomuni, har nógv fremmand vóru við. Vit royna at knýta góð vinaløg í nærsamfelagnum; hetta hjálpir vónandi í arbeiðnum at seta nýggja samkomu á stovn.

## *20. Fríggjadagur* *1.Kor.10.15-11.1*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

Nakrir flóttar úr Ukraina koma á møti hjá okkum sunnudag. Ukrainar her um leiðir skipa eisini fyri tiltøkum í Glostrup Frikirke, sum venda sær til flóttar úr Ukraina. Vit vilja fegin sum samkoma hjálpa og stuðla teimum, sum búgva í útlegd millum okkara.

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 5, Timon 3**



**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 2**

## *21. Leygardagur* — *Es. 22.1-14*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**
Mamma Stephen doyði fyri jól. Vit eru takksom fyri tíðina, vit høvdu saman við henni og okkara nærmastu í Onglandi, áðrenn hon andaðist.

## *22. Sunnudagur* — *1.Kor. 11.2-16*

**ONGLAND, Taunton**
**Dorit og Simon Marshall**
Vit takka Harranum fyri árið, ið fór. Hann var trúfastur og sonn troyst í sváru tíðunum í sambandi við sjúka barnabarn okkara, Zoe. Harrin var eisini við á avbjóðandi ferðum okkara. Vit vitja ikki í Føroyum í januar, tí Dorit passar beiggjarnar hjá Zoe, meðan hon er innløgd.

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 11**

## *23. Mánadagur* — *Es. 22.15-25*



**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**
Tænastan ber við sær nógva ferðing. Biðið, at vit áhaldandi hava styrki og heilsu til tað.

## *24. Týsdagur* *1.Kor. 11.17-34*

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 14, Noah 13, Karis 9, Judah 7, Ethan 5**



Biðið fyri bíbliulærarunum í mengensamkomuni, fyri Vincent, Kamalus, Anton og Jack, og fyri evangelisku tænastuni í mengenbygdum, serliga Pakia. Biðið, at børnini falla væl til og fáa vinir. Ethan hevur fingið heilsubót, og úrslitið av hjartakanningini hjá Karis var gott. Noah skal fáa oyrnaskurðviðgerðir, tann fyrra verður 25. jan. Pápi Simon hevur tað gott eftir hjartaskurðviðgerðina. Vit vitja Ongland og Føroyar í 2023.

**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**

## *25. Mikudagur* *Es. 23.1-18*

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**



Alt Nýggja Testamenti er nú endaliga kannað, so eftir er bert at rættlesa og gera neyðugar broytingar. Matteus- og Lukasevangeliið verða prentað hvørt sær fyrst, og verður alt Nýggja Testamenti helst klárt at prenta í 2024. Vit

byrja nú rættlestur og annað, sum skal gerast áðrenn prent. Í mai er ætlanin at fáa alla 1. Mósebók kannaða. Takk fyri forbøn og stuðul í árinum, sum fór.

## *26. Hósdagur* *Sálm. 65*

**FØROYAR**
**Maria og Jens Bech**



Brátt fór árið – klettaføstu trúfesti Harrans við lið. Tað er við dirvi Hansara, vit halda á, at Hann skal gera tað við. Takk fyri bønir tykkara, saman vit tæna lið um lið, til lúðurin ljóðar, Harrin kemur, og vit verða tikin við.



**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**

## *27. Fríggjadagur* *1.Kor. 12.1-13*

**Elam Ministries, Evropa**
**Margretha Højgaard Poulsen**



Aftur í ár bjóða vit samkomum og einstaklingum á online-skeið. Iranar og afganar úr øllum Evropa taka lut. Biðið áhaldandi fyri Iran og Afganistan, har umstøðurnar eru hættisligar!

## *28. Leygardagur* *Es. 24.1-23*



**OM, SUÐURAFRIKA,**
**Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**

Gott nýggjár og takk fyri tað farna! Komandi mánaðirnar byrja vit ein stuðulsbólk fyri rúsevnismisnýtarar í Mamelodi. Biðið um vísdóm, sum vit leggja alt til rættis, so bólkurin verður til andaliga uppbygging og stuðlar fólki at fara til avvenjingar.

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Rebekka 17, Hanna 14**

*Í dag fyllir Adonia Johannesen 15 ár
*Í dag fyllir Emma Grace Tuohy 15 ár

## *29. Sunnudagur* *1.Kor. 12.14-31*



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 17, Aron 10, Noah Kristian 9**

2022 hevur verið eitt torført ár, men vit eru takksom fyri at taka lut í arbeiðnum at stuðla trúboðarum ígjøgnum tænastuna The Well International. Bøn okkara fyri 2023 er, at fleiri leggjast aftrat toymi okkara, so vit verða fleiri at bera byrðarnar.

**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**
Vit eru byrjað at umseta Jóhannesevangeliið til føroyskt.

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 13, Nana 11, Louie 9, Rio 3**



**OM, LOGOS HOPE, TEENStreet**
Umborð á Logos Hope eru Siri og Martin í Grund við famulju, Esther Dam Hansen og sum nýggj Eik Klæmintsdóttir.

*Í dag fyllir Petra í Prestgarði 9 ár
*Í dag fyllir Tabita Christiansen 9 ár


| | |
|---|---|
| Útgevari | KBS (Kristniboðssambandið) |
| Blaðnevnd | Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang. |
| Avgreiðsla | Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057 |
| Uppseting | Grafikmaster, tel. 502022 |
| Myndasavn | info@grafikmaster.fo |
| Prent | Føroyaprent, tel. 314555 |
| Teldupostur | prayerservicefo@gmail.com |
| Heimasíða | www.kbs.fo |

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705


©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope! Bønarløtan takkar Onnu og Richard Schwartson fyri trúfasta og drúgva tænastu í Bókasøluni Logos, nú tey gevast við hesum virksemi! Biðið, at onnur taka hesa alneyðugu, andaligu ábyrgd á seg!

## NÝGGJ BÓK!

**264 síður 225 kr.**




Hann kom í heimin við ongari tign. Foreldrini vóru ikki gift. Hann varð føddur í fjósi, í vanda fyri at doyggja, vaks upp sum flóttafólk. Hann doyði við enn lægri tign: dómfeldur, sligin, bløðandi, vrakaður, nakin, vanærdur. Hann hevði ongan status. Tign sum kongur er tað síðsta, tú hevði hugsað um Jesus. Kundi ein slíkur ávirka heimssøguna? Svarið er ja! Tað er hesa ávirkan, bókin snýr seg um. Henda ávirkan á farna og nútíðar søgu fær okkum – uttan mun til religiøs sjónarmið – at spyrja: *Hvør er hesin maður?*

FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36, Klaksvík
Tel. 718191, leirkerid@leirkerid.fo